filmar

# Transformers
## – robot nostalgi frá 80unum
*- Ein ungdóms sf-filmur.*

### Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com

Søgan í sf-filminum Transformers er so løgin og b-filmkend. Eina løtu helt eg, at tað kundi ikki passa. Søgan her er um bilar, sum enda sum robottar, og um tvey sløg av robottum, ið hava barst í øldir. Tá eg hoyrdi, at allur filmurin byggir á 80'ara robotleikur, mundi eg avskriva allan filmin.

Søgan er so um hendan Sam, sum gerst óður, tí hann sær sín nýggja bil verða stolnan. Ein løgreglubilur kemur honum til hjálpar, men vit eitt broytist løgreglubilurin seg til ein stóran og vandamiklan robot, tað sama hendir við bilinum hjá honum (!).

Tað eru tvey sløg av robottum í Transformers, eina slagið, Decepticons, vilja hava alt vald á galaksuni, meðan hinir, Autobots, vilja royna at berjast móti at hetta hendir. Fólk eru mest til fortreð.
Ein av hesum, Autobot Bumblebee, vil fegin verða vinur við Sam og Mikaela, men hann er noyddur at tosa gjøgnum sangir í útvarpinum í bilinum.

### Hvat ólukkan er hetta?

Jú, leikstjórin Michael Bay (hann hevur fyrr gjørt filmar sum Bad Boys 1 og 2, Armageddon og Pearl Harbor) hevur tikið 80'ara robotleikurnar og gjørt hetta til ein film. Tey, sum kenna "Autobots", "Decepticons", "Optimus Prime", "Megatron" og "Bumblebee", vita, hvat hetta er um - fyri meg segði hetta mær einki. Spurningurin er, um fólk, sum vóru smádeingir og smágentur í 80'unum, hava eitt so nostalgiskt forhold til hesar leikur, at tey tíma í biograf?



Sjálvt um tað tekur langa tíð at svølgja søguna í Transformers, so er filmurin ikki so galið undirhald.
Tað eru nógv kend fólk við í filminum, so sum John Turturro og Jon Voight, men tó er hetta ein løgin og pretensiøsur filmur, sum er flott gjørdur, men søgan er so løgin, at tað telur álvarsliga nógv niður.



**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| Sam Witwicky | Shia LaBeouf |
| Agent Simmons | John Turturro |
| Optimus Prime | Peter Cullen |
| Megatron | Hugo Weaving |
| Bumblebee | Mark Ryan |
| Ironhide/Barricade | Jess Harnell |

Leikstjóri **Michael Bay**. Frumframførdur mikudagin 4. juli 2007 í Havnar Bio. Loyvdur øllum yvir 11 ár.

# Liv í frælsi ella »Die Harder 4«

**Bruce Willis ella John McClane er komin aftur, hann hava vit sæð fyrr sum løgreglumann í Die Hard filmunum, ið hava skriva filmsøgu innan actionfilmin í okkara tíð.**



Hesuferð roynir McClane at halda skil á teenage dóttrini Lucy, sum onnur ung so er hon farin at gera uppreistur.

Sama dag, 4. juli, sum er amerikanski tjóðardagurin, skal hann handtaka unga teldusnýkin Matt Farrell (Justin Long), men tá fer alt í sorl og støðan gerst hættislig kring alt landið.

Tjóðardagin hava yvirgangsfólk sett sær fyri at leggja alla orkuveiting lamna, og alt landið er farið í svart. Bakmaðurin er Thomas Gabriel (Timothy Olyphant), men tað hann ikki veit, er at ein gamaldags løgreglumaður, sum McClane er farið eftir honum og so er tað ikki stuttligt at vera yvirgangsmaður.

### Bruce megastjørna

Tað var við fyrstu Die Hard filmunum frá 1988, at Bruce Willis gjørdist ein superstjørna. Her kom ein heilt nýggj actionhero fram, ið var harðari enn hinir, sum eisni hevði humor og júst hetta gjørdist kult innan amerikanska filmmentan.

McClane er ikki nakar Rambo ella ein dreparamaskina sum Terminator, hann er bara ein vanligur "cop", ein løgreglumaður við stórum trupulleikum við myndugleikum, við ekskonum og við lívinum annars, sum at enda fær nokk og ikki vil yvirgeva seg.

Nú er Bruce eldri, men hann er líka so harður og djarvur sum fyrr. Die Hard 4 er líka so feitur sum hinir.



**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| John McClane | Bruce Willis |
| Thomas Gabriel | Timothy Olyphant |
| Matt Farrell | Matt Farrell |
| Mai | Maggie Q |

Leikstóri **Len Wiseman**. Frumframførdur í Havnar Bio 29. juni. 129 minuttir. Aldursmark 15. ár.

Einki er sum tær sær út til í hesi søguni. **Illusionisten** var eitt hitt í biografunum, og sum DVD er hann ikki verri. Søgan er um romantikk, politikk og morð. Gandakallurin, ella skaparin av illusiónum, er ein vandamikil listamaður fyri krónprinsin Leopold í Wien. Hann sendir tí løgregluna eftir honum. Hetta er tey somu, sum hava gjørt Sideways og Crash. Ein fínur filmur, sum onkuntíð er í so ótrúligur og tí eitt sindur lættisoppakendur.



**Fur** er ein løgin filmur, men tó eisini rættuliga góður, um fotografin Diane Arbus (1928-1971), sum var heimskendur fyri myndir av til dømis risum, dvørgum o.s.fr. Ein originalur filmur við bæði Nicole Kidman og Downey Jr. sum super freak.



**Life is a Miracle** er enn ein filmur í røðini hjá Emir Kusturica. Vit eru í Bosnia í 1992, tað er kríggj millum serbar og kroatar. Kusturica er heimskendur fyri sínar svakligu (yvirmettu) Balkan freak show filmar, men eg havi ongantíð kunna torga hetta slagið av yvirpøstum filmum.




**The Holiday** er ein kærleiksfilmur. Bæði Iris og Amanda hava brúk fyri at sleppa burtur at sleikja teirra sár. Iris bjóðar síni hús í Suðuronglandi fram á alnótini, og Amanda svarar hesi lýsing. "The Holiday" líkist 10.000 øðrum miðalvánaligum filmum og er einki móti "When Harry Met Sally", "Sleepless in Seattle" ella "Casablanca".




**Déja Vu** er ein av teim bestu actionfilmunum sum er gjørdur í 2006. Hann er upptikin í New Orleans aftaná vanlukkuna, hetta var forkunnugt fyri hendan ummælaran, sum kennir (kendi) býin væl. Hetta er ein "genta, ein bumba" og ein "bad guy" filmur, men ein av teim heilt góðu av slagnum. Eykatilfarið er eisini ótrúliga umfatandi.




Sosialurin